## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi, um kvøldið minkar hann vindin nakað. Sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hann minkar vindin niður í lot av útnyrðingi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og14 stig. Um kvøldið veksur hann vindin upp í ein strúk av útsynningi og regn.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Sunnudagin upp í hvassan vind av vestri og ælingur, men hann minkar vindin um kvøldið. Mánadagin Lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 12 stig.

# Har summargrøna veltan var

**Víða hvar í bønum eru fólk at síggja í eplaveltunum. Tey taka upp og royna at fáa undir tak, áðrenn fleiri óveður rættiliga fara at gera enda á veltunum**

HEYST
*Edvard Joensen*

**Miðvági:** So er komið at teirri tíð, at hugsast skal um at fáa undir tak fruktirnar av tí, sum sett varð niður at vaksa í vár.

Hvar tú kemur fram, er fólk at síggja í bønum. Nú er tað ikki hoygging, sum fyri er, uttan velturnar, ið skulu tømast.

Eplini, sum sett vóru niður í vár, hava tænt sínum endamáli, og nýggj verða tikin upp.

Nakað innavert Giljanes í Miðvági hittu vit kendan mann, sum saman við yngri ættarliðum var farin at venda fløgunum aftur.

Ivan Johannesen fyrrverandi løgtings- og landsstýrismaður gekk enn sum áður líka spelkin og bragdligur og tók upp.

Hann læt væl at. Upp í eini 12 fold hevði hann fingið í onkrari veltu, og eisini her var væl undir, segði hann. Hann lat at, at tað ljóðaði frá góðum yvirhøvur á hesum leiðum. Og velturnar vóru frískar og væl fyri. Eingin spilla var at síggja nakrastðani, segði hann.

Ivan Johannesen skundaði sær at fáa eplini til høldar, áðrenn restirnar av navnabróðuri hansara, sum hevur gjørt um seg í Karibia og har á leið, kanska koma ein túr framvið og gera enda á seinastu slokkunum, sum eftir standa.



*Fleiri ættarlið í veltuni*
*Mynd: Edvard Joensen*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 1 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 16 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 11 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 10 |
| Moskva | – |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 11 |
| Bukarest | 20 |
| Paris | 17 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 27 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 25 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 27 |
| New York | 25 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 27 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | – |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 983 hPa. við Stockholm fer eystureftir. Eitt brúgvalag norðan fyri Føroyar fer suðureftir og viknar. Eitt hátrýst, 1034 hPa. vestan fyri Biscaya stendur í stað og viknar.




Hátrýstið yvir Íslandi fer í landsynning og verður yvir Føroyum fríggjadagin. Lágtrýstið sunnan fyri Hvarvið fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjakvøldið.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 21/09 kl. 06⁰⁰–22/09. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,4°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° - Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,9 mm – mált frá 21/09 kl. 06⁰⁰–22/09 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í september: 165,3 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

21. sept.: Fyrra kvarter
22. sept.: Mánin næstur jørðini
28. sept.: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. sep | 02.52 | 15.21 | 01.52 | 14.21 | 02.07 | 14.36 | 04.52 | 17.21 | 05.52 | 18.21 | 01.07 | 13.36 | 00.07 | 12.36 | 03.07 | 15.36 | 04.07 | 16.36 | 02.37 | 15.06 | 03.52 | 16.21 |
| 24. sep | 03.51 | 16.19 | 02.51 | 15.19 | 03.06 | 15.34 | 05.51 | 18.19 | 06.51 | 19.19 | 02.06 | 14.34 | 01.06 | 13.34 | 04.06 | 16.34 | 05.06 | 17.34 | 03.36 | 16.04 | 04.51 | 17.19 |
| 25. sep | 04.47 | 17.13 | 03.47 | 16.13 | 04.02 | 16.28 | 06.47 | 19.13 | 07.47 | 20.13 | 03.02 | 15.28 | 02.02 | 14.28 | 05.02 | 17.28 | 06.02 | 18.28 | 04.32 | 16.58 | 05.47 | 18.13 |
| 26. sep | 05.39 | 18.02 | 04.39 | 17.02 | 04.54 | 17.17 | 07.39 | 20.02 | 08.39 | 21.02 | 03.54 | 16.17 | 02.54 | 15.17 | 05.54 | 18.17 | 06.54 | 19.17 | 05.24 | 17.47 | 06.39 | 19.02 |